## Venjingartíðir fyri kappingarárið 2003/2004

**Mánadag í fimleikahøllini í Hoyvík:**
Kl. 18.00 - 19.00 (D12)

**Týsdag í Gundadalshøllini:**

| Bani I | Bani II | Bani III |
|---|---|---|
| kl. 15.45 (G10/D10) | kl. 15.45 (G10/D10) | kl. 15.45 (G10) |
| kl. 17.00 | kl. 17.15 (MK) | kl. 17.00 (G12) |
| kl. 18.15 (D12) | kl. 19.00 (G16) | kl. 18.30 (G14/D14) |
| kl. 19.30 (KVU/2K) | kl. 21.00 (MM) | kl. 20.00 (MO) |
| kl. 21.00 (1K) | | kl. 21.30 (1M/D16/MU) |

**Hósdag í Gundalshøllini:**
Kl. 20.00 (1K) (MM) (G12/14)
Kl. 21.30 - 23.00 (KVU/2K) (MK) (G16)

**Fríggjadag í Gundalshøllini:**
Kl. 18.00 - 20.00 (MK) (MM) (1M/16)

**Flogbóltsfelagið FLEYR**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

## Avloysari fyri skrivstovufólk í Løgtinginum

Eitt avloysarastarv fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja. Tíðarskeiðið er frá 1. oktober 2003 til 1. mai 2004.
Uppgávurnar eru í høvuðsheitum hesar:
Telefonavgreiðsla, avgreiðsla ferðir, ferðaforskot og ferðauppgerðir, ymisk skráseting í sambandi við løgtingsarbeiðið, harumframt annað vanligt skrivstovuarbeiði.
Tann, ið settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving ella samsvarandi útbúgving ella royndir at økinum. Ein treyt fyri at verða settur er, at viðkomandi er kønur í føroyskum og hevur royndir at arbeiða við teldu.

Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu vera Løgtinginum, Tinghúsvegur 1-3, Boks 208, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. september 2003 kl. 16.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Thurid Debess, skrivstovuleiðara, tel. 31 10 00.

## Leiðari fyri dagrøktina á Viðareiði

Lýst verður eftir leiðara fyri dagrøktarskipanina á Viðareiði fulla tíð, fyri leiðara í farloyvi.

Umsøkjarin skal hava námsfrøðisliga útbúgving sambært Løgtingslóg nr. 65 frá 10.05.2000.

Starvið er leyst at søkja frá 1. oktober 2003, og verður sett eitt ár fram.

Løn sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir saman við próvnum og møguligum viðmælum verða at senda til:

**Viðareiðis Kommunu**
**FO-750 Viðareiði**

í seinasta lagi 23. september 2003

Meiri fæst at vita frá núverandi leiðara:
Elin N. Reines tlf. 211341.

**Viðareiðis Kommuna**
FO-750 Viðareiði
Tlf +298 451083
Fax +298 451094
Teldupostur: vid.kommuna@kallnet.fo

Dagrøktarskipanin á Viðareiði hevur 5 ár á bakið og er í dag nominerað til 30 børn. 6 dagrøktarmammur eru í skipanini. Skipanin hevur eina spælistovu við spæliøki rundanum, har dagrøktarar og børn dagliga kunna koma saman.

## Eydnuhjól

**verður í VB-húsinum 10.-11. oktober.**

**Um nakar vil stuðla við einum luti, takka vit fyri.**

| | |
|---|---|
| Maria | tel 373207 |
| Helena | tel 373483 |
| Any | tel 373110 |
| Elise | tel 373459 |
| Ingvør | tel 373069 |

**Vágs Bóltfelag**

1905 VB

høvuðsstuðul:
SUÐUROYAR SPARIKASSI

## TIL SØLU

### FAIRLINE MIRAGE 29



Báturin er í sera góðum standi, verður seldur um hóskandi boð fæst.

Prísuppskot 450.000,–

**Tel 22 81 05**

## FÓLKADANSUR

## Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík



Byrjað verður sunnukvøldið 28. sept. kl. 19.00 – 21.00

Kostnaður fyri veturin **kr. 400,00 pr. par**

Lærarar eru Matilda og Tom Nielsen

Tilmelding á telefon:
Ann 422368/264820
Elin 422291/265844
Ida 422425/213425

**Dansifelagið Fragdin**

Øll eru vælkomin!

## Frá Happadráttinum

**Viðvíkjandi Happadráttarsøluni hjá Arna Samuelsen, Klaksvík.**

Happadráttarseðlarnir til 2. drátt 13. oktober 2003 verða seldir hjá

**Jonnu Johannessen, Hvannasund tlf. 452013 og 752013**

frá 9. september til 2. oktober 2003.

Seinasti søludagur til 2. drátt er 2. oktober 2003.

**HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN**

www.sosialurin.fo



## Pedagogur og hjálparfólk

### til Dagstovnin á Svangaskarði, Toftir

Til eina nýggja barnagarðsstovu við 23 børnum í aldrinum 4–5 ár verður søkt eftir:

- 2 pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna
- 1 hjálparfólki at arbeiða 40 tímar um vikuna
- 1 hjálparfólki at arbeiða 35 tímar um vikuna, sum partvís kemur at arbeiða í útibarnagarðsstovuni eftir nærri avtalu.

at byrja **01.10.2003** ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta at umsøkjararnir:**
- ynskja at geva børnunum umsorgan og kærleika
- hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- hava góð samstarvsevnir og kunnu taka ábyrgd
- eru við til at menna tað pedagogiska arbeiðið á stovninum.

Í Dagstovninum á Svangaskarði eru tríggjar stovur: Útistovan, sum húsast í kjallarahæddini, Spælistovan, Dagrøktini og nýggja barnagarðsstovan, sum húsast á ovaru hæddini.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Pedagoglønirnar í skala 9–14 og hjálparfólkalønirnar í skala 1–5.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til: Ingrid Hansen, leiðara, tlf. 448760 / 228460.

Um eingin pedagogur søkir pedagogstørvini, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

**Umsóknir**
saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Nes Kommunu í hendi í seinasta lagi **24.09.2003, kl. 12.00.**

**Nes kommuna**

## Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki at gera reint í Frítíðarskúlanum, sum heldur til í Missiónshúskjallaranum.

Reingerðin er 2 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna frá 01.10.03 at rokna.

Løn sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivligar umsóknir skulu sendast til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 24.09.03 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Nes kommunu, tlf. 447586.

**Nes kommuna**

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til Hósvíkar kommunu. Fyribils tíðaravmarkað til hálvt ár.

Arbeiðið umfatar: Upptøku av leysgangandi hundum o.a. fyrifallandi arbeiði í kommununi.

Løn samb. sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22.09.2003.

**Hósvíkar kommuna**

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## UNDIRVÍSARI

**Søkt verður eftir undirvísara til spennandi starv á Kvasir**



**Hevur tú førleika at undirvísa í:**
– Teldukoyrikorti á grundskeiðstøði og víðkaðum støði



**Hevur tú áhuga at menna nýggj skeið, og hevur førleika innan:**
– Myndaviðgerð
– Heimasíðusmíð
– Onnur økir



**So eru spennandi møguleikar á Kvasir**

Send teldupost við C.V. til sj@farodane.fo ella ring fyri at hoyra meira um starvið



Tel **320 204**
**www.kvasir.fo**

## 10-mannafar og 19 tonsari til sølu

- Nýbygt 10-mannafar til sølu fyri 45.000 kr.
- 19 tonsari Hamranes uttan fiskiloyvi til sølu um hóskandi boð fæst

**Tlf. 44 80 74**

## Suðringar !

Musikkskúlin í Suðuroy hevur tørv á ljóðførum. Í tí sambandi vilja vit heita á øll, sum hava eitt hvørt ljóðføri hjá Suðuroyar musikkskúla ella Tvøroyrar hornorkestri, um at seta seg í samband við Jens Knudsen á tlf. 22 30 53 ella 37 20 26, og avtala hvar ljóðføri kan verða avhandað.

## Arbeiði á dekkverkstaði!

Søkt verður eftir einum fólki at arbeiða á dekkverkstaði okkara.

Tað er ein fyrimunur um tú ert útbúgvin lastbil- ella bilsmiðjur, – hetta er tó ikki eitt krav.
Tú skalt vera hugaður at veita viðskiftafólkum okkara góða og skjóta tænastu.

Talan er um fast arbeiði. Føst løn samb. avtalu.

Er nakað fyri teg, so send okkum eitt bræv ella ein e-mail.

DEKK SENTRIÐ

Falkavegur 1 · 110 Tórshavn
e-mail: gunnar@dekk.fo

**Mentamálaráðið**
*Landsmiðstøðin*

## Talilærari

Fyri talilærara í barnsburðarfarloyvi sóknast Sernámsdepilin eftir avloysara í tíðarskeiðinum 1. oktober 2003 til umleið 31. mars 2004.

**Arbeiðið fatar um:**
10 t/v í Sernámsdeplinum við eygleiðingar-/greiningararbeiði og audiologopediskum virksemi annars.
14 t/v við talivenjing/málmenniandi arbeiði við børnum undir skúlaaldur í Tórshavnar Kommunu.

Arbeitt verður í neyvum samstarvi við foreldur, lærarar, pedagogar og royndar talilærarar.

Annars verður víst til arbeiðstíð fyri fólkaskúlalærarar og galdandi ásetingar.

**Førleikakrøv:**
- Fólkaskúlalærari-/pedagogur við talilærara-útbúgving.
  Audiologpedur við aðrar grundútbúgving og við verkligum royndum við smábørnum er eisini skikkaður.
- Førleika til bæði sjálvstøðugt arbeiði og til neyvt samstarv við fakbólkar og foreldur.

**Lønartreytir:**
Eftir sáttmála ímillum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið ella ímillum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi 23. september 2003.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Egon Hansen, tali-hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra – Sernámsdepilin tlf. 314522.

Tórshavn, 9. september 2003
**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036 · FO-165 Argir
Tlf. 314522 · Fax 310196
t-postur: sernamsdepilin@snd.fo